# BÝRÁÐSFUNDUR

**Dagfesting:** 24.09.2020 kl. 19:00

Møtt vóru: Sonni á Horni, Eivin Breiðaskarð, Kristian Petersen, Edva Jacobsen, Eyðun á Lakjuni, Árant Berjastein, Magni Jøkladal, Ólavur Larsen, Sigurð Simonsen,

Vara limir:

Ikki møtt:

Skrivari: Henrik Weihe Joensen, kommunustjóri

| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Til avgerð** | | | |
| 1/20 | 20/00453-2 | Heimild frá býráðnum til kommunustjóran, at undirskrivað skjøl viðvíkjandi keypi og sølu av fastari ogn o.t. sambært kommunustýrislógini § 44, stk. 2 | 1 |
| 2/20 | 20/00176-2 | Parkeringsvørður til Fuglafjarðar kommunu | 3 |
| 3/20 | 20/00334-2 | Høgni Kjeld - Umsókn um byggiloyvi til sethús | 5 |
| | | | |

## 1/20
## 20/00453-2 Heimild frá býráðnum til kommunustjóran, at undirskrivað skjøl viðvíkjandi keypi og sølu av fastari ogn o.t. sambært kommunustýrislógini § 44, stk. 2

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 24.09.2020 | 1/20 |

**Tilráðing**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til viðgerðar í | Fuglafjarðar býráð | | |
| Stutt lýsing | Sambært kommunustýrislógini § 44, stk. 2 skulu skjøl viðvíkjandi keypi og sølu av fastari ogn o.t. verða undirskrivað av borgarstjóranum og einum persóni, sum kommunustýrið hevur heimilað til tess. Í hesum førinum kann Fuglafjarðar býráð geva kommunustjóra, Henrik Weihe Joensen, hesa heimild | | |
| Bakgrund | | | |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt**<br>Kommunustýrislógin<br>Møgulig skjøl | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | Borgarstjórin mælir til at geva kommunustjóranum hesa heimild | | |
| Dagf | 17/09-2020 | | |

**Býráðið 24. september 2020**
Býráðið samtykti einmælt (9-0), at heimila kommunustjóra Henrik Weihe Joensen, at undirskrivað skjøl í sambandi við keyp og sølu av fastari ogn

## 2/20
## 20/00176-2 Parkeringsvørður til Fuglafjarðar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Ferðslunevndin | 23.06.2020 | 2/20 |
| 2 Býráðið | 24.09.2020 | 2/20 |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Ferðslunevndini | | |
|---|---|---|---|
| Stutt lýsing | Umsitingin hevur havt fund við felagið Vaka á Tvøroyri. Fundurin snúði seg um tær tænastur, sum Vaka kann bjóða í sambandi við parkeringsansning.<br>Eisini greiddi leiðarin frá, hvat er skilagott at gera, áðrenn ein parkeringsvørður verður settur á uppgávuna fyri eina kommunu sum Fuglafjarðar kommunu.<br>Tað eru fleiri atlit, sum skulu vera í lagi, áðrenn ein parkeringsvørður kann fara í arbeiði.<br><br>**Ískoyti 17. september 2020**<br>Borgarstjórin ynskir býráðið at taka støðu til, um parkeringsvørður skal setast í starv í Fuglafjarðar kommunu samsvarandi tilmæli frá tekniska leiðaranum og samtykt hjá ferðslunevndini, dagfest 23. juni 2020, møguliga í samstarvi við aðra kommunu | | |
| Bakgrund | **Upprunin til málið**<br>Ferðslutrygd | | |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt**<br>Ferðslulógin og ferðslunevndin<br>• Møgulig fylgiskjøl<br>FK j. nr. 20/00176-1 Fundarfrágreiðing frá fundi millum Vaka og umboð fyri teknisku umsiting<br>FK j.nr. 20/00176-5 Upprit um skipanina viðvíkjandi parkeringsvørðum | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | Tekniski leiðari mælir til at fáa ymisk arbeiðir frá hondini sambært fundarfrágreiðingini millum Vaka og umboð fyri teknisku umsitingina, áðrenn ein parkeringsvørður verður settur | | |
| Dagf | 18. juni 2020. | | |

**Ferðslunevndin 23. juni 2020**
Nevndin tekur undir við tilmælinum hjá tekniska leiðaranum, og at ein parkeringsvørður verður settur.

**Býráðið 24. september 2020**
Borgarstjórin skjýtur upp, at tekniska deild ger eitt ítøkiligt uppskot, at farið verður í holt við at gera tær ferðsluteknisku fyrireikingar, sum skulu til, fyri at ein parkeringsvørður møguliga verður settur. Málið skal síðani viðgerast av býráðnum av nýggjum. 8 býráðslimir tóku undir við uppskotinum hjá borgarstjóranum. Fyri atkvøddu Sonni á Horni, Eivin Breiðaskarð, Ólavur Larsen, Kristian Petersen, Edva Jacobsen, Sigurð Simonsen og Eyðun á Lakjuni. Ímóti atkvøddi Magni Jøkladal.

## 3/20
## 20/00334-2 Høgni Kjeld - Umsókn um byggiloyvi til sethús

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 02.07.2020 | 32/20 |
| 2 Tekniska nevnd | 10.09.2020 | 37/20 |
| 3 Býráðið | 24.09.2020 | 3/20 |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Teknisku nevnd. |
|---|---|
| Stutt lýsing | Umsitingin hevur fingið umsókn frá eigara av matr. nr. 143ch um byggiloyvi til íbúðarbygning, har ovasta hæddin er ein íbúð, og 1. hædd og 2. hædd hava tvær íbúðir hvør sær.<br>Umsitingin hevur ráðført seg við advokat kommununar og er niðurstøðan tann, at bestu ráðini er at gera eina serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 143ch.<br>Neyðugt er at gera eina frámatrikulering til fimm íbúðareindir, áðrenn verkætlanin verður gjøgnumførd.<br>Hendan byggiverkætlan frígevur 5 bústaðareindir og sølu av einum sethúsum, sum hevur tvær íbúðareindir.<br>Treytirnar í byggisamtyktini og BK17 skulu uppfyllast.<br><br>**Ískoyti**<br>Umsitingin hevur havt fund við løgfrøðing kommununar um tilgongdina at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 143ch, Fuglafjørður, sí tilmæli frá fundinum millum umboð frá Sókn og umboð kommununar.<br>Mælt verður til at gera eina serstaka byggisamtykt fyri matrikulin, har broytingarnar eru gjørdar soleiðis, at tær samsvara við karaktering í økinum. Víst verður til FK j. nr. 20/00334-5.<br><br>Umsitingin hevur gjørt eitt uppskot til broyting í byggisamtyktini saman við einum korti fyri matr. nr. 143ch, Fuglafjørð.<br>Víst verður til uppskot um broytan av byggisamtyktini fyri matr. nr. 143ch, Fuglafjørður, sí FK j. nr. 20/00334-6.<br><br>**Ískoyi 17. september 2020**<br>Umsóknin hevur verið viðgjørd fyrstu ferð tann 2. juli í ár. Síðani hevur tekniska deild viðgjørt málið í samráði við løgfrøðing kommununar, og eitt endaligt uppskot er gjørt um broyting í byggsamtykt galdandi fyri matr. nr. 143ch, Fuglafjørður. Teknska nevnd viðgjørdi málið seinnu ferð tann 10. september, og tók undir við uppskotinum til broyttu byggisamtyktina.<br>Víst verður til uppskot til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 143ch, Fuglafjørður við tilhoyrandi korti til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 143ch, Fuglafjørður, sí FK j. nr. 20/00334-8.<br>Umsitingin hevur hoyrt grannan, sum er eigari av matr. nr. 143ch, um uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri økið.<br>Umsitingin hevur sent endaliga uppskotið til hoyringar hjá umsøkjara. |

| | |
|---|---|
| | Svar er komið aftur við eini góðkenning.<br>Endaliga uppskotið er klárt at senda til almenna hoyring og til Føroya Landsstýri. |
| Bakgrund | Gagnnýta byggiøkir hjá Fuglafjarðar kommunu betri. |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt**<br>Byggisamtyktin , BK17 og uppskot til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 143ch, Fuglafjørður<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>FK j. nr. 20/00334-1 Umsókn um byggiloyvi til íbúðarbygging<br>FK j. nr. 20/00334-5 Tilmæli frá løgfrøðingi kommununar<br>FK j. nr. 20/00334-6 Uppskot til broytingar í byggisamtyktini fyri matr. nr. 143ch, Fuglafjørður<br>FK j. nr. 20/00334-8 Uppskot til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 143ch, Fuglafjørður_19. september 2020<br>FK j. nr. 20/00334-8 Kortskjal til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 143ch, Fuglafjørður_19. september 2020 |

| Viðgerð | | | |
|---|---|---|---|
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |

| | |
|---|---|
| Tilmæli | Tekniski leiðarin mælir til at gera eina serstaka byggisamtykt fyri hendan matrikulin.<br>**Nýtt tilmæli**<br>Tekniski leiðarin mælir til at taka undir við uppskotinum um broytta byggisamtykt fyri matr. nr. 143ch, Fuglafjørður. Víst verður til FK j. nr. 20/00334-6.<br>**Nýtt tilmæli**<br>Tekniski leiðarin mælir til at taka undir við endaliga uppskotinum til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 143ch, Fuglafjørður saman við korti til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 143ch, Fuglafjørður, sí FK j. nr. 20/00334-8. |
| Dagf | 17. september 2020 |

**Tekniska nevnd 02. juli 2020**
Nevndin tekur einmælt undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 10. september 2020**
Nevndin tekur einmælt undir við tilmælinum.

**Býráðið 24. september 2020**
Býráðið tók einmælt (9-0) undir við tilmælinum frá teknisku nevnd, at loyva serstakari byggisamtykt fyri matr.nr. 143ch, Fuglafjørður

Fundurin lokin kl. 20:05

Sonni á Horni

Eivin Breiðaskarð

Kristian Petersen

Edva Jacobsen

Eyðun á Lakjuni

Árant Berjastein

Magni Jøkladal

Ólavur Larsen

Sigurð Simonsen